# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Málspolitikkur heldur enn partapolitikkur

Um góða viku kemur nýggja løgtingið saman. Valúrslitið gjørdi, at ein stórur partur av tingmanningini varð skiftur út. Mest merkisverda broytingin var tann, at kvinnumanningin meira enn tvífaldaðist, úr trimum upp í sjey umboð.

Hetta er uttan iva skipanini við Føroyum sum eitt valdømi fyri at takka. Vit fegnast um, at fleiri kvinnur nú fara at manna okkara høgtvirda ting. Hetta er bæði rætt og náttúrligt og í tráð við andan í demokratiinum. So tillukku til allar kvinnurnar á tingi. Tillukku til løgtingið. Vit ivast heldur onga løtu í, at henda broytingin fer at hava positiva og hepna ávirkan ikki bert á, hvørji mál verða tikin upp og raðfest í tinginum, men eisini á oftani alt ov einvísa og kompromileysa partapolitikkin, sum forðar fyri víðskygni og skilagóðari menning. Vónandi fara vit at síggja nettupp kvinnurnar bróta niður smøl og fastløst floksmørk og slóða fyri, at tað heldur verður farið eftir sakini/málinum enn eftir hvørjum øðrum. Har alt ikki bara verður gjørt upp eftir, hvat gagnar sær og sínum, sínum flokki, síni samgongu osfr. – men heldur heildini.

Eingin ivi er um, at økta kvinnumboðanin fer at víðka demokratisku karmarnar og endurnýggja demokratiska grundvøllin. Vónandi fer henda sannroynd eisini at gera, at tað verður størri samstarv millum ymsu flokkarnar og eisini millum samgonguflokkar og andstøðu. Sjálvsagt fer hetta ikki at broyta tann demokratiska veruleika, at ein meiriluti av flokkunum á tingi skal velja eitt landsstýri, sum má og skal hava ein setning at arbeiða eftir.

Hinvegin hevði tað verið gott, um garðurin millum tey stýrandi og andstøðu gjørdist lægri, og her fara vit helst sum longu sagt at síggja kvinnuumboðanina gera ein mun. Um somu tíð, sum vit skulu hava virðing fyri teimum demokratisku spælireglunum, so eiga vit alla tíðina at gera alt fyri at gera hesar rúmligar og liðiligar. Føroyskur politikkur hevur verið ov nógv merktur av einum eljustríði millum flokkar, politiskar vengur, persónar, samgongu og andstøðu osfr. Latið málini, innihaldið, telja mest og ikki innpakningin, tvs. persónarnar og flokkarnar.

Okkum tørvar tí í avgerandi mun at fáa meiri samstarv og virðing og her eisini konsensus inn í føroyskan politikk, ja sleppa burtur úr sundurlyndinum. Tað er rætt, at ymsar ideologiir, meiningar og flokkar skapa tað neyðuga fjølbroytni og dynamikkin, ið er partur av demokratiinum. Fjølbroytt og livandi orðaskifti við ymiskum meiningum og holdningum er bæði neyðugt og mennandi. Men lat okkum ikki gloyma samstarvið, sum byggir á virðing og áhuga fyri øðrum. Lat okkum eisini fáa tað besta burtur úr - nú nýggja skipanin við einum valdømi skal roynast í verki - tí menniskjansliga løgtingstilfeinginum.

**Sosialurin**

## Takk fyri tær 223

NITA NÆS



Fari at takka fyri valstríðið og ynskja tykkum øllum, sum vald vórðu, hjartaliga tillukku. Ein serlig heilsan til Jóannes, Gerhard, Helenu, Hans Paula, John og Katrina – alla eydnu í samgongusamráðingunum!

Tað var sera harmiligt, at flokkuirn misti ein mann. Eg eri sera kedd um, at eg ikki fekk møguleika at koma á ting og gera eitt gott arbeiði fyri flokkin og samfelagið, men eg eri sera fegin fyri mínar 223 atkvøður. Ja, so hjartans fegin!Eg vil hervið takka øllum, sum lótu sína atkvøðu til mín til hetta løgtingsvalið.

Eg takki veljarum: Á Argjum, í Fámjin, á Fossanesi, í Fuglafirði, í Gøtu, á Hellunum, í Hovi, í Hvalba, í Klaksvík, í Kollafirði, í Kvívík, í Leirvík, í Oyndarfirði, á Oyrarbakka, í Porkeri, í Runavík, í Sandavági, á Sandi, í Sandvík, á Skála, á Strondum, í Sumba, í Svínoy, í Sørvági, í Tórshavn, á Tvøroyri, í Vági og á Velbastað.

Við javnaðarkvøðu - hjartans tøkk øll somul!

## Fáið nú yvirtikin mál at virka fyrst

JOHAN PETERSEN



**Uttan iva er ein av truplu telvingunum í verandi samgongusamráðingum yvirtøka av enn fleiri málsøkjum. Tíverri hava vit eina røð av longu yvirtiknum málum, sum als ikki fungera. Hesi áttu fyrst at fingist at fungera, so sum tey áttu, áðrenn hugsað verður um fleiri yvirtøkur**

Løgtingsvalið styrkti loysingarvengurnar hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Fólkaflokkurin hevur longu proklamerað, at øll málsøkir skulu yvirtakast og Poul Michelsen vil hava eina smala loysingarsamgongu. Eisini javnaðarumboðini Helena Dam á Neystabø og John Johannesen halla loysingarvegin.

**Yvirtøkur eitt mál í sjálvum sær**

Tíverri vísa allar royndir, at yvirtøkur hjá loysingarflokkunum eru eitt mál í sjálvum sær. Um eitt málsøki eftir at tað er yvirtikið fungerar ella ikki, hevur als ongan týdning! Í tí andanum verða mál yvirtikin og so lítið av peningi avsett, at málsøkini als ikki fáast at fungera. Yvirtøkur kosta, at fyrigykla sær nakað annað, er fávitskut.

Eitt dømi um hetta er Skipaeftirlitið, sum skuldi kunna røkjast av átta fólkum, sjálvt um serkøn á økinum ávaraðu um, at tað kravdist minst 20-25 fólk, skuldi nakað skil vera á. Hesi serkønu, sum vóru við í einum ráðgevarabólki, sum fyrireikaði yvirtøkuna, fingu ikki fundarboð aftur.

**Føroyar nær við at vera blacklistaðar**

Tíverri er hetta ikki eindømi. Dømini eru nógv um málsøkir, sum ikki fungera, t.d.:

**Postverki:** skuldi vera ein sonn gullgruba. Nú fær hesin stovnur ikki endarnar at røkka saman

**Fólkaskúlin:** tað skuldi ikki vera rætt at hava ein danskan skúla. Nú hann er føroyskur, er hann dumpaður við einum braki í Pisa-kanningunum

**MRCC-støðin:** sjálvandi skuldu føroyingar vera betri enn danir at skipa fyri bjarging á føroyaøkinum. Havandi Jøkulsfelli og Olshanu sum sveinastykkir í huganum, er hetta ein stór skomm

**Skipaeftirlitið:** fyri at fáa dagligu gongdina bara at fungera so nøkulunda, er alt sýnsvirksemi av skipum, sum áður var danskt og ókeypis, nú latið til norsk, ensk, týsk og fronsk klassafeløg, sum taka seg sera, ja, sera væl betalt. Skipaeigarin skal gjalda. Úrslitið er, at vit hava eitt amputerað Skipaeftirlit, sum bert hevur førleika at sýna smábátar. Ein onnur fylgja er, at meðan Danmark í altjóða ParisMoulistanum liggur í tí ovasta triðinginum á hvíta listanum, liggja Føroyar í tí niðasta triðinginum á gráa listanum beint omanfyri svarta listan.

**Fólkakirkjan:** er yvirtikin í óðum verkum uttan at neyðugu fyrireikingarnar eru gjørdar. Úrsliti er, at vit ikki kunnu seta prestar í starv, men megu dúva uppá pensioneraðar prestar.

Eisini ikki yvirtikin málsøkir, sum vit stýra við peningi frá Danmark og hava heimild at prioritera, so sum vit vilja, fungera als ikki so sum tey skullu.

**Sjúkrahúsverkið verður niðurprioriterað**

Dømi um hetta er sjúkrahúsverkið, sum rættuliga kom í fokus um jólini. Ein yvirlækni gjørdi í 1998 eina útrokning, sum vísti, at síðan refusiónsskipanin varð broytt til blokk í 1988, hevði sjúkrahúsverkið fingið eina milliard krónur minni samanborið við gomlu skipanina. Sostatt er helst talan um 2 milliardir krónur í farna 20-ára skeiðnum. Er tað nakar sum heldur, at hetta ikki hevði gjørt mun?

Nei, fái nú fyrst øll hesi nógvu málsøkir at fungera, áðrenn gloypt verður yvir meira. Vælsignaðu tit, royni og geri orðini hjá Jógvan E. Ósá til skammar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.